# Smalkaðar fótbóltsføroyar

**Petur Simonsen**



**Fara broytingarnar í landskappingini í 2005 at skunda undir miðsavnanina av fótbóltinum? Og verða tað bert 6 heldur enn 10 lið í fremstu deildini um nøkur ár?**

Skuldi kanska ikki havt blandað meg upp í hetta málið um hvussu landskappingin í 2005 verður skipað. Avgerðin er jú longu tikin skilst, og harumframt so eri eg ikki politikari, men praktikari í føroyskum fótbólti. Men kanska er tað júst tær praktisku royndirnar, sum fáa meg úr stólinum.

Má siga, at eg eri rættiliga samdur við Finni Helmsdal um, at tað er sera sannlíkt, at ætlaðu broytingarnar hjá FSF í landskappingini fyri 2005 so við og við vilja hava tað við sær, at fremsta deildin endar við 8, ella helst 6 liðum. Stutt og greitt tí hvørki manpower ella kapitalgrundarlag verður til fleiri 1. deildarlið.

Men júst hetta, sum Finnur og eg eru samdir um verður úrslitið, um hildið verður fast við kappingarleistin hjá FSF í nøkur ár, er eisini orsøkin til, at vit eru púra ósamdir, um hann skal setast í verk ella ikki.

Sum eg lesi Bjarka Mohr, formann í kappingarnevnd FSF's, so er hann ikki ósamdur við Finni um, at broytta kappingin væl kann viðføra færri lið í fremstu deildunum. Tað merkir kortini ikki, at hetta er tað, hann eisini ynskir. Og satt at siga, so rokni eg neyvan við, at færri lið í fremstu deildini liggja fremst í huganum hjá kappingarstjóranum og heimasandsmanninum.

Finnur vísur á, at smærru feløgini ikki fara at megna fyrisitingarligu og fíggjarligu avbjóðingina, og tí verður logiska loysnin størri eindir. Eg nevndi í fyrru greinini, at *"vandin, við at trýsta so nógv á, er, at serliga teir meira tilkomnu leikararnir, familjumenninir og teir, sum hava størri avbjóðingar á arbeiðsmarknaðinum, velja heldur at gevast á hægsta stigi. Og spurningurin er, um føroyskur fótbóltur hevur ráð til at missa tað minsta vetið av ábyrgdarkenslu og rutinu"*.

Hesi bæði tilsamans gera tað meira sjálvsagt at miðsavna. Og so hendir júst tað, sum eg eri bangin fyri, men sum Finnur so staðiliga vónar, og sum hann hevur skrivað upp og niður um seinastu mongu árini — færri lið í fremstu deildini.

Men tað er ikki serliga áhugavert hvat Finnur ella eg ynskja ella ikki ynskja. Tað, sum er áhugavert, er hvat feløgini halda og ynskja. Ynskja tey at smalka "fótbóltsføroyar" frá 10 til 6 lið í bestu deildini? Ynskja tey, sum eina natúrliga fylgju av hesum, at smalka um rekruteringina til fótbóltin kring landið? Ynskja tey at sleppa tí serstøðu fótbólturin hevur á flestu plássum í landinum? Stutt sagt, ynskja feløgini eina enn størri miðsavnan í føroyskum fótbólti?

Skal kanska siga beinanvegin, at halda feløgini og FSF, at logiska fylgjan av broytingini við tíðini ikki verður til færri lið og einar smalri "fótbóltsføroyar", so er best skjótast gjørligt at gloyma hetta innleggið.

Men er tað so, at nøkur fynd er tí, sum Finnur og eg siga, ja, so eigur tann spurningurin at standa sína roynd, opið og erligt, á røttum stað. Hann eigur ikki at vera avgreiddur, um eg so má siga, í gjøgnum eina fjalda dagsskrá undir skjólinum av einari broyttari landskapping. Slíkt stórmál hevur uppiborið eitt breitt og sakligt orðaskifti, grundað á øll viðkomandi viðurskifti.

Segði at byrja við, at eg var ikki politikar, men praktikari. Og eg vil leggja aftrat, at er tað nakað, vit praktikarar práta um, so er tað júst hetta: hvussu menna vit tann einstaka leikaran og føroyskan fótbólt sum heild.

Ikki tað, at praktikararnir eru á einum máli. Og eg havi higartil ikki hoyrt um nakra patent loysn, tá talan er um menning í fótbólti. Men lyklaorðini í hesum práti eru: eitt áhaldandi, miðvíst og dygdargott arbeiði í feløgunum og so tað, at hvør einstakur leikari fær tær avbjóðingar, sum eru hóskandi til førleikan — bæði í gjøgnum venjing og dystir. So kappingin hevur eisini avgjørt týdning fyri hvussu fótbólturin her á landi mennist. Onki ivamál um tað.

Eisini er breið semja um, at kvantitetur er ein fyritreytin fyri kvaliteti. Tað verður ongin elita uttan eina ávísa breidd. Og smalka vit "fótbóltsføroyar", er vandi fyri, at vit tá sjálvi saga greinia av, sum vit sita á.

Ein tøkk til Bjarka Mohr fyri, at hann alment í greinini. ***Á gáttini til kappingarárið 2005*** kemur við síni frágreiðing og nøkrum viðmerkingum til málið. Men eg fari at enda at loyva mær at tríva í okkurt av tí, sum Bjarki skrivar (skrivað við *skákskrivt*).

Bjarki sigur, *"at talan er ikki um nakað nýtt mál. Fremstu venjarar og leikarar okkara hava tosað um júst hesar broytingar í fleiri ár"*. Kann vera, at við tað, at talan er um"fremstu venjarararnar", at eg eri so lítið vitandi. Men tað, sum eg kenni til, so hava nógvir ymiskir leistir verið nevndir. Leisturin við 3 umførum og uttan summarsteðg hevur ikki mær vitandi ligið ovastur.

Bjarki sigur *"At feløgini eru til reiðar at taka ímóti hesum broytingum, kom týðiliga til sjóndar á árliga fundinum beint eftir kappingarlok. Tað varð, og er, mín greiða fatan, at flest allir, ið góvu sína áskoðan til kennar, vóru samdir um, at tað er neyðugt at fremja broytingar, skulu vit menna* okkum leikliga framyvir". Trupulleikin við hesum er bara, at fundurin dró út, og at ein fittur partur av feløgunum var farin, tá málið bleiv lagt fram. At siga, at viðgerðin av hesum stórmálið var óvanliga stutt og ikki serliga djúptgangandi, er ikki ov nógv avgjørt. Ikki minst um hugsað verður um drúgvu viðgerðina, okkurt "minni" mál fekk.

Og tá Bjarki *"seinastu tíðina, afturvendandi, hevur hoyrt útsagnir um, at ætlaðu broytingarnar, av landskappingini, skulu góðkennast av aðalfundinum hjá Fótbóltsambandi Føroya í februar 2005"*, kundi tað kanska títt uppá, at tað kortini ikki er so greitt, hvat er avtalað og ikki á fundinum í november.

*"At tilrættisleggja kappingarskipanina, – hava valdu nevndarlimirnir fulla ábyrgd av, og tilsvarandi heimild til at fremja í verki"*. Púra samdur, men tað er nú ein stórur fyrimunur, um avgerðirnar hava breiða undirtøku millum tey, tær viðkoma. Vónandi er tað eisini soleiðis í hesum føri. Men eg loyvi mær at ivast, ikki minst um Finnur hevur rætt í sínum spádómi um tey 6 liðini í fremst deildini.

Tá vil eg siga, at tað varð óklókt at *"seta gerð aftan orðini"*. Tá er dekan ov seint at *"staðfesta, hvørt vit eru á rættari leið, ella vit eru noyddir at saðla um"*.

Við elastikkinum er tað soleiðis, at longri tað verður spent út, jú "smalari" verður tað. — Til eitt vist, so støkkur tað. So illa gongst neyvan, hóast toygda kappingin smalkar "fótbóltsføroyar". Men fyri at halda meg til eina venjaramálisku, so kann nýggi kappingarleisturin lætt gerast til eitt *fram og tvey aftur* fyri føroyskan fótbólt. Livst so spyrst.

# Suðuroyarsorgarleikurin

**Zakarias Wang**



Nú verður nógv tosað um, at Suðuroyggin er tilafturskomin í mun til oyggjarnar norðanfyri.

Einki er yvir at dylja at so er, men vert er at hugsa um, at fyri einum hundrað árum síðani var tað øvut. Tá vóru tað oyggjarnar norðanfyri Suðuroyarfjørð, sum vóru tilafturskomnar.

At framgongdin er ymisk í ymsum landslutum og í ymsum londum er eitt alkunnugt fyribrigdi. Í søguni síggja vit at nøkur lond taka seg fram um onnur, men so støðgar framgongdin. Vit sóu Bretland taka seg fram í 19. øld. So tók Týskland dyk á seg og fór fram um Bretland, og verður tjóðarúrtøkan í dag roknað fyri hvønn íbúgva, so er Italia framman fyri Bretland.

Men hetta sleppur ongum undan at kanna, hvussu slíkt hendir. Hvør er atvoldin til framburðin? Hvør er so atvoldin til at hann støðgar? Kann nakað gerast fyri at fáa framburð aftur, um stígur er komin í?

Spyrja vit hvør atvoldin var til at Suðuroyggin var tann partur av Føroyum sum kláraði seg best eftir at vit fingu fríhandil í Føroyum og fram móti fyrra heimsbardaga, so er greitt, at kapitalisman var ein sólskinssøga í Suðuroy. Framtakshugaðir menn settu virki á stovn, og teir fingu loyvi til at virka á tann hátt sum tað hóvaði teimum. Teir vunnu pengar, men forkomu teimum ikki í eyri og seyri. Í staðin settu teir pengar í nýggj virki, keyptu skip og vunnu upp aftur meir.

Hvat var tað so, sum gekk galið?

Ein orsøk var sjálvandi, at einskiljingin av jørðini ongantíð kom í lag. Fyri at kapitalisman skal rigga, krevst at nýggj virki støðugt koma í staðin fyri tey gomlu sum fara fyri bakka. Av tí at ein stórur partur av jørðini her eins og aðrastaðni í Føroyum var almenn ogn, bar ikki til at reisa kapital til nýggj virki við at seta jørðina í veð.

Ein onnur orsøk var at kapitalistarnir í Suðuroy ikki sóu til, at børn teirra fingu nóg góða útbúgving. Teir høvdu havt ráð til at sett ein studentaskúla á stovn so tað unga ættarliðið kundi lært fremmand mál og fingið hægstu útbúgving innan handil og samskifti, men tað hendi ikki. Úrslitið var tí, at teir t.d. ikki høvdu nakran í tí uppvaksandi ættarliðinum, sum megnaði at seta ein banka á stovn. Høvdu teir gjørt tað, er væl hugsandi, at vit norðanfyri framvegis noyddust at koma til Suðuroyar at arbeiða.

Í staðin kom bankin at vera í Havn. Kapitalistarnir í Suðuroy noyddust at koma norð um fjørð sum biddarar tá ið hart stóð á hjá teimum, og ofta fingu teir krakk, soleiðis at virki teirra fóru á heysin.

Eitt sum gjørdi sítt var jú, at tað yngra ættarliðið, sum ikki hevði nóg góða útbúgving til at fóta sær í tí modernaðu tíðini, eisini gloymdu at grundarlagið fyri at reka virki var at spara í góðum tíðum, fyri at hava nakað at standa ímóti við, tá tíðirnar vóru vánaligar.

Somuleiðis skiltu teir ikki, at fortreytin fyri at kapitalisman kann rigga er at vit hava eitt statsvald, sum kann loysa nakrar av teimum uppgávum, sum privatfólk einsæris ikki kunnu loysa. Til hetta krevst skattainntøka, og einasti mátin at fáa skatt er við at ein partur av framleiðsluni hjá virkjunum verður goldið í skatt. Teir hildu, at teir t.d. kundu sleppa undan at gjalda tað sum havnir og vegir kostaðu.

Samstundis kom ein politiskur flokkur fram, sum bjóðaði teimum skattafrælsi, tí hann kundi fáa danir at gjalda tað sum tað kostaði at loysa almennar uppgávur í Føroyum. Hetta var Sambandsflokkurin, og kapitalistarnir í Suðuroynni lótu seg tøla. Teir høvdu ikki nóg góða útbúgving til at skilja, at tað sum hendir í einum samfelag sum fær stuðul uttanífrá er at øll framleiðsla dettur niðurfyri, tí tað einasta sum loysir seg í einum slíkum samfelaga er at flyta inn vørur at selja teimum, sum fáa pengar uttanífrá. Teir dugdu ikki at síggja, at hetta als ikki kundi gagna teimum, men mest sum bara handilsvinnuni norðanfjørðs.

Síðani hendi sum kunnugt tað, at vit fingu enn ein politiskan flokk, Javnaðarflokkin, sum segði seg duga enn betri enn Sambandsflokkurin at útvega pengar úr Danmark, og eisini sýndi tað í verki. Enn verri gekst, og tað er har vit eru nú.

Skulu vit so bara lata standa til og siga, at einki er at gera?

Tað er eingin orsøk til.

Eitt sum vit kunnu gera og sum einki kostar, men hevði gjørt nógv gagn, var at einskilt ta almennu jørðina. Tað hevði beinan vegin loyst upp fyri nýggjum vinnumøguleikum.

Eitt annað, sum hevði hjálpt Suðuroynni almikið, hevði verið at sett tær donsku veitingarnar til Føroya niður á 0 kr. Hetta hevði gjørt at vit í øllum landinum noyddust at framleiða nakað heldur enn at liva av posamati, og í tí kappingini liggur Suðuroyggin væl fyri.

Eitt annað, sum hevði gjørt fittan mun fyri Suðuroynna, hevði verið at fingið skil á samferðsluviðurskiftini.

Í so máta er bert eitt at gera, og tað er at binda Suðuroynna til føroyska samferðslukervið. Vit skulu hava breiðar og høgar tunlar í Suðuroynni, eisini til Vesturvíkar, og vit skulu hava undirsjóvartunnil til Sandoynna og úr Sandoynni til Streymoynna. Tá verður strekkið úr Vági til Havnar ikki nógv longri enn úr Havn til Vestmanna. Tá fer at bera til at seta eitt virki á stovn í Suðuroy og fáa arbeiðsmegi norðanífrá, tí tá fer at bera til at koyra millum morgun og kvøld.

Hetta er sjálvandi nakað, sum kostar pengar. Íløgan er umleið tað dupulta av tí sum Norrøna stendur okkum í, men raksturin er bíligari enn tann vit hava við núverandi ótíðarhóskandi skipan.

Eitt slíkt tiltak hevði kunnað fingið vend í gongdina í Suðuroynni.

Í hesi støðu er tað kanska heppið, at vit hava fingið ein løgmann, sum er valdur í Suðuroy. Frammanundan honum høvdu vit ein løgmann, sum var valdur í Norðuroyggjum, og hann fekk í lag at binda hesar oyggar til høvuðsvegakervið, so tað er at vóna, at hesin fer at roynst suðuroyingunum eins dyggur.

Hendir hetta, so er eingin orsøk til at tala um nakran sorgarleik, men um eina gleðisøgu.